# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Haldur Vang 60 ár



Í dag, mikudagin 22. mars, verður Haldur Vang á Toftum 60 ár. Hann hevur í mong ár verið byggimeistari, og hann hevur eisini verið bygdarráðsformaður.

Haldur er ættaður úr býlinginum á Gørðum í Kaldbak. Foreldrini eru Anna Katrina, fødd Hansen og ættað úr Mikkjalstoft við Gøtugjógv, og Karl Vang (1916-2000). Anna Katrina er 83 ára gomul.

Haldur er elstur av átta systkjum. Hini eru Eyðin (1947), Hjørleif (1948), Anfinn (1952), Karin (1955), Hanna (1956), Arna (1960) og Karstin (1963). Haldur býr á Toftum, Karin býr í Oyndarfirði, og øll hini búgva í Kaldbak.

Haldur plagar at siga, at hann fór úr skúlanum tann dagin, tá ið hann fylti fjúrtan ár. Hetta var í 1960 og um tað mundið, tá ið NATO kom í Mjørkadal. 1. mai hetta árið og fram á heystið var Haldur við til at arbeiða veg í Mjørkadali, har teir búðu í barakkum og í vikuskiftunum fóru til hús. Karl, pápi Haldur legðist um hetta mundi uppi og fór at arbeiða í Mjørkadali. Hann hevði annars verið sjómaður og hevði siglt eitt nú við Mjóvanesi, Atlantsfarinum og Bresti.

Í 1961 fór Haldur í læru hjá Peter Michelsen, sum tá var stórur byggimeistari í høvuðsstaðnum. Hann mundi hava upp móti áttati á lønarlistanum, og teir bygdu fleiri av kendu bygningunum í Havnini. Eitt nú Saltsøluna og Bacalao, Havnar Bio, Emil Juel Thomsen, Brockie, Studentaskúlan í Hoydølum og Minkagarðin.

Haldur varð avlærdur 17. mai í 1965, og síðani tá hevur hann fyri tað mesta verið sjálvstøðugur vinnurekandi. Fyrstu árini var tað í Havnini, har hann saman við Párli Petersen bygdi fleiri sethús. Haldur búði í Havnini fram til 1970, og størsta arbeiðið, sum hann og Páll gjørdu, mundi vera á Læraraskúlanum, har teir báðir og Eyðin, bróðurin, arbeiddu fyri Karl Hansen, sála, í Klaksvík, sum leveraði innhurðarnar og lolftini.

Eitt skifti búði Haldur aftur í Kaldbak. Tá arbeiddi hann nakrar mánaðir á Marinplast hjá Guttormi Djurhuus, og so var hann í tvey ár í Norðsjónum við kraftblokkabátinum Skúgvi.

Í 1973 flutti familjan til Toftir at búgva. Har hevur Haldur bygt nógv sethús, og so hevur pf. Haldur Vang verið við til at byggja fleiri stórar bygningar. Teir vóru við til at byggja Heilsumiðstøðina í Runavík, og teir hava sett nógvar hallir upp. Eitt nú hava Haldur og hansara menn útinnt stórarbeiði hjá Vónini, Skipafelagnum, Mekanik, Timburhandlinum í Runavík, Lynfrost, Eysturoyar Heilsølu og á kai økinum í Oyndarfirði.

Síðst í áttati árunum leyk Haldur prógv sum byggiteknari í Havnini. Hetta var samstundis, sum hann stóð fyri síni egnu fyritøku. Fyrst í níti árunum var Haldur saman við teimum, sum arbeiddu hjá honum, í Týsklandi og gjørdu byggiarbeiði. Tá ið tað miðskeiðis í níti árunum var farið undir uppboðssølu á Toftum, var Haldur eitt skifti annar av uppboðshaldarunum.

Haldur giftist 18. februar í 1967 Mary fødd Heinesen og ættað av Toftum. Tey eiga snotuligt og fjálgt heim á Heygum. Mary og Haldur eiga trý børn: Bergtóra (1967), Karl (1969) og Hans (1976). Bergtóra og Hans búgva í høvuðsstaðnum, og Karl býr á Toftum. Abbabørnini eru fimm – tríggir dreingir og tvær gentur.

Haldur sat í bygdarráðnum í Nes kommunu 1985-88, 1989-92 og 2000-2003. 1989-92 var hann formaður í bygdarráðnum. Hann er við í hjálpararbeiði í Rumenia, hann var í 1988 saman við øðrum í Venezuela og bygdi føroysk hús til trúboðarafamilju í frumskóginum, og nú er hann ein av undangongumonnunum at byggja Nebo samkomuni á Toftum nýggjan sal.

60 ára føðingardagin er Haldur Vang staddur á flatlondum.

**J**

## Andlát og jarðarferðir

**Sonja Mortensen, ættað av Strondum**, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 19. mars, 76 ára gomul.

Bønarhald verður úr Landssjúkrahúskapellinum í dag klokkan 17.30.

Jarðarferðin verður frá Kirkjuggarðskapellinum hósdagin klokkan 13.00.

Týsdagin 21. mars andaðist **Marjun á Krákusteini, Argir**, 57 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin klokkan 17.30 í Kirkju- og Missiónshúsið á Argjum. Jarðarferðin verður fríggjadagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Marjun, kunnu lata Missiónshúsinum á Argjum eina peningagávu, konto í peningastovnunum.

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Sonja Jacoba Mortensen**

fødd Hansen,
ættað av Strondum, búsitandi í Havn

andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 19. mars, 76 ára gomul.
Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 17.30
Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum hósdagin kl. 13.00

*Familjunnar vegna*

**Johanna og Elisa**

Maskinmeistaraskúlin:

## 14 fingu prógv sum maskinistar



Mánadagin 20. mars fingu 14 maskinistar handað prógv á Maskinmeistaraskúlanum.

Fremra rað f.v.: Svenning Hansen, Fuglafjørður, Erik Mechior Hansen, Sørvágur, Óli Súni Hansen, Oyndarfjørður, Hanni Højgaard, Rituvík, Kári Regin Jacobsen, Klaksvík, og Gert Norðoy Jensen, Klaksvík

Aftara rað f.v.: Bárður Kjeld, Saltangará, Jørgen Martin Niclassen, Sørvágur, Kristmund R. Nielsen, Sandur, Adrian Reinert, Kollafjørður, Hans Hendrik Stenberg, Vágur, Jákup M. Thomsen, Skúvoy, og Chris Ørvarodd, Sandavágur. Elian T. á Ørg, Sørvágur, vantar á myndini.

Tríggir fingu virðisløn: Bárður Kjeld og Jákup M. Thomsen fingu 1. virðisløn og klokku við barometri frá ávikavist Tryggingarfelagnum Føroyar og Trygd.

2. virðisløn og kikara frá Føroya Sparikassa fekk Jørgen Martin Niclassen.

**Dagurin í morgin**

**23. mars. Fidelis**. Sigst at vera halgimenni, sum varð tikið av døgum í Afriku í 5. øld, men annars vita teir einki um hann. Fidelis merkir tann trúfasti.

Rasmus Effersøe doyði hendan dagin í 1916.

